# Blákollan søkir eftir námsfrøðingum

Blákollan er ein kommunalur stovnur, normeraður til 40 børn.

**Søkt verður eftir:**
1 námsfrøðingi 35 tíma viku at byrja 15. august
1 námsfrøðingi 30 tíma viku at byrja 15. august
1 námsfrøðingi 30 tíma viku at byrja 01. august fyri námsfrøðing í barnsburðarfarloyvi.
Størvini eru í barnagarðsstovu.

**Vit kunnu bjóða:**
- Ein stovn í menning, har tú fært møguleika, at seta dám á gerandisdagin.
- 40 fitt børn, íð fegin vilja verða kreativ saman við tær.
- Ein góðan foreldrabólk.
- Eitt foreldraráð, íð er opið fyri nýhugsan.
- Ein ráðleggingardag um árið.
- Eitt starvsfólkavikuskiftið, um árið.

**Vit vænta av tær:**
- At tú hevur góð samstarvsevni.
- At tú ert álítandi og tekur ábyrgd.
- At tú dugir at arbeiða sjálvstøðug (ur).
- At tú dugir at møta børnunum á teirra støði.
- At tú hevur yvirblikk.
- At tær dámar at brúka náttúruna sum ein part av arbeiðinum.

Lønar og setunarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um ongin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Umsókn og prógv við møguligum viðmælum skulu vera Blákolluni, Kjalarvegur 30, 700 Klaksvík í hendi í seinasta lagi 15. juni 2005.

Meira fæst við at venda sær til leiðaran Eydnu Frederiksberg, tlf. 458866 ella 227347.

**Blákollan**
**Kjalarvegur 30**
**700 Klaksvík**

# Varaleiðari

Søkt verður eftir varaleiðara til ein stovn við 30 børnum í aldrinum 3-7 ár. Starvið er 30 tímar um vikuna á einari stovu við 15 børnum. Ætlandi verður starvið sett 1.august 2005 annars eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Starvið er lønt á lønarstigi 11-17.

Nærri upplýsingar um starvið og stovnin fáast við at venda sær til leiðaran.

Umsókn saman við avritum av prógvi og viðmælum verður at senda stovninum í seinasta lagi mikudagin 15. juni 2005.

**Barnagarðurin Vípan**
Vípuvegur 3
100 Tórshavn
Tlf. 31 75 35
E-mail: bg-vipan@post.olivant.fo

# P/F FØROYA LÍVSTRYGGING

**Val av 5 umboðum at røkja áhugamál tryggingartakarans, meðan P/F Føroya Lívstrygging verður einskild.**

Vinnumálaráðið hevur heitt á P/F Føroya Lívstrygging um at skipa fyri einum vali, har 5 persónar, sum eru tryggingartakarar hjá P/F Føroya Lívstrygging, verða valdir at umboða tryggingartakararnar í sambandi við, at P/F Føroya Lívstrygging skal einskiljast.

Allir tryggingartakarar hjá P/F Føroya Lívstrygging hava valrætt og kunnu stilla upp sum umboð og vera stillarar.

**Hvør kann gerast umboð**
Øll, sum eru tryggingartakarar hjá P/F Føroya Lívstrygging, kunnu stilla upp til valið. Um tú ynskir at stilla upp sum umboðsfólk, skalt tú boða frá hesum skrivliga til P/F Føroya Lívstrygging, Postboks 206, 110 Tórshavn, í seinasta lagi tann 6. juni 2005.

Fyri at kunna stilla upp til valið, skalt tú hava undirskriftir frá 15 stillarum. Øll, sum eru tryggingartakarar hjá P/F Føroya Lívstrygging, kunnu verða stillarar. Ein persónur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og einans eitt valevni kann vera á hvørjum uppstillingarlista.

Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk á P/F Føroya Lívstrygging og teirra hjúnafelagar ella sambúgvar, kunnu ikki veljast sum umboðsfólk. Eingin kann virka sum umboð, um tey eru sett í starv ella arbeiða hjá fyritøkum, sum eru kappingarneytar hjá P/F Føroya Lívstrygging.

Tá ið P/F Føroya Lívstrygging hevur fingið fráboðan frá tryggingartakarum, sum ynskja at stilla upp til val sum umboðsfólk, verður lýst í bløðunum, hvørji valevnini eru og tíðarfreistirnar fyri, nær atkvøðuseðil kann umbiðjast og nær hann skal vera skrivstovu felagsins í hendi.

Tórshavn, tann 23. mai 2005

**P/F FØROYA LÍVSTRYGGING**

# Hvalbiar skúli

Lýst verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2005/2006 at lesa avlopstímar.

Starvið er uml. hálva tíð og fevnir m.a. um dreingjafimleik, tekstviðgerð í 8. og 9. flokki og flokslærari í 2. flokki.

Starvið verður lønt eftir avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18-1 til 27-4.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi týsdagin 14. juni 2005.

**Hvalbiar skúlastýrið**
**v/ Róin Schrøter, formaður**
**850 Hvalba**

# Miðvágs-Sandavágs skúli

Vegna farloyvi, lækkað tímatal, avlopstímar og næmingar við serligum tørvi verða hesi lærarastørv lýst leys at søkja.

**Tíðaravmarkað til skúlaárið 2005/2006:**
- 1 fulltíðarstarv (umsøkjari, ið kann undirvísa í ítrótti/svimjing dreingir hevur fyirmun).
- 1 fulltíðarstarv.
- 1 starv sum sergreinalærari 6 t/v at undirvísa í motorlæru.
- 1 starv sum sergreinalærari 4 t/v at undirvísa í sjóvinnu.

**Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.**

- 1 starv sum stuðul 15 t/v.

**Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.**

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 332820 ella 218820.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. juni 2005.

**Skúlastýrið fyri**
**Miðvágs-Sandavágs skúla**
V/Bjørn Akselsen
Hammersheimbsvegur 20
FO 360 Sandavágur

# Sumbiar skúli

Vegna farloyvi verður søkt eftir lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2005/2006. Starvið er umleið 10 tímar.

Umsøkjari, sum kann undirvísa í svimjing, hevur fyrimun.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.1.

Meira fæst at vita um starvið hjá fyrstalæraranum á tlf. 370666 ella 373875.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 14. juni.

**Skúlastýrið fyri Sumbiar skúla**
v/ Eyðvør Müller · tlf. 370077
970 Sumba

# Fólk søkist

– Feriuavloysarar pr. 1. august.
– Fast starv pr. 1. august.
– Kvøldvaktir, at byrja skjótast gjørligt.

Umsókn verður at senda til:

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 31 10 60

frants restorff